

## LÍV søkir eftir næmingi

**Marknaðurin fyri lívstrygging og eftirløn í Føroyum er í stórum vøkstri. Fyri at kunna veita viðskiftafólki okkara bestu loysnirnar, søkir LÍV eftir næmingi.**

Sum næmingur hjá okkum verður tú partur av toyminum, ið stendur fyri eftirlønum og samskifti við viðskiftafólk okkara, har tú fert at tryggja teimum bestu tænastu í tøttum samstarvi við tínar starvsfelagar.

Vit vænta, at tú ert framsøkin, íðin og hevur góð samstarvsevni, eins og tú ert væl fyri í talu og skrift. Útbúgvingin tekur tvey ár og gevur breiðan førleika innan fíggjarheimin.

Tú skalt hava lokið students-, HF- ella HH-prógv. Fært tú prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Poul Christoffur Thomassen á tel 231 111 ella á pct@liv.fo

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2008.

*LÍV er Føroya størsti veitari av lívs- og eftirlønartryggingum til føroyska arbeiðsmarknaðin. Í løtuni starvast 28 fólk á LÍV. Tryggingargjøldini vóru í 2007 288 mió. kr., og vit umsita eftirlønaruppsparing fyri 2,46 mia. kr.*

Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn
Tel. 311111 · Faks 351110 · www.liv.fo · liv@liv.fo

SENDISTOVAN



## Avloysari til roknskapardeildina

**Lív søkir eftir fólki til roknskapardeildina fyri eitt av starvsfólkum okkara, ið fer í barnsburðarfarloyvi.**

Starvsinnihaldið er í høvuðsheitum at bóka inngjøld í debitorbókhaldinum umframt at røkja aðrar áhugaverdar uppgávur á fyritøkuni.

Tú hevur eitt sjálvstøðugt arbeiðslag, góð samstarvsevnir og ert íðin. Tú hevur students-, HF- ella HH-prógv og skalt helst kunna byrja í starvinum 1. juli og í seinasta lagi 1. august 2008.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Eyðnu Justinussen, eydna@liv.fo, 21 95 75.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2008.

*Føroya Lívstrygging er Føroya størsti veitari av lívs- og eftirlønartryggingum til fakfeløg og virkir. Í løtuni starvast 28 fólk á Føroya Lívstrygging. Tryggingargjøldini í 2007 vóru 288 mió. kr., og vit umsita eftirlønaruppsparing fyri 2,46 mia. kr.*

Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn
Tel. 311111 · Faks 351110 · www.liv.fo · liv@liv.fo

SENDISTOVAN

*Søkt verður eftir*

## Skipara/stýrimanni



**Starvið:**
Skipari/stýrimaður innan offshore vinnu, herundir oljuvinnu, kápulvinnu o.a.

**Krøv og ábyrgd:**
Viðkomandi kemur at hava ábyrgd av, at formligu reglur á økinum, verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum skipsførari/skipari/stýrimaður við STCW átekning.
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár.
- Trygdarskeið, ikki eldri enn 5 á.r
- Roykkavara/sløkkileiðara skeið.
- GMDSS skeið.
- ARPA skeið.
- Kunnleika til ISM og ISO 9000 góðskustýring.

**Løn og setanartreytir:**
Verður sett eftir avtalu.
Umsóknin saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu verða okkum í hendi skjótast tilber.

**Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til:**
Gunnbjørn Joensen, stjóra, tel 42 25 03 ella e-mail: gunnbjor@thor.fo
Ella Justin Philbrow, manning, tel 42 25 03 ella e-mail: justin@thor.fo

**P/F THOR**
420 Hósvík
www.thor.fo

THOR

FO-420 Hósvík · Faroe Islands
Tel 422 503 · Fax 422 383 · www.thor.fo · thor@thor.fo

*P/F THOR, er eitt felag sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni, og annað virksemi í hesum sambandi, víst verður til heimasíðu okkara www.thor.fo*

# MONTØRUR

**Casa søkir eftir montøri at byrja beinanvegin.**

Casa er partur av Nema-samtakinum og bjóðar skrivstovuinnbúgv til virkir og stovnar, umframt sniðinnbúgv til heimið. Vit leggja dent á holla ráðgeving og fyrsta floks tænastu.

### Arbeiðið er bygt á toymi og fevnir um
- Montering og uppseting av møblum á verkstaði okkara og úti hjá kundum
- Flutningsuppgávur til og frá goymslum okkara
- Aðrar uppgávur í samráði við leiðaran í Casa
- Internar húsavarðaruppgávur
- Annað fyrifallandi arbeiði í hesum sambandi

### Yrkisførleikar
Vit vænta, at tú hevur royndir í yrkinum og hevur handverksligan førleika. Koyrikort er krav, og fyrimunur er eisini at kunna koyra trukk og lastbil.

### Eginførleikar
Tú ert fyrikomandi og skyldurøkin, sýnir áræði og ábyrgd, og tú arbeiðir sjálvstøðugt eins væl og saman við øðrum. Tú ert likamliga væl fyri, tí starvið kann stundum vera kropsliga krevjandi.

Arbeiðsvikan er 40 tímar, og lønin verður sambært avtalu. Heldur tú, at starvið er nakað fyri teg, frætta vit fegin frá tær. Umsókn skal vera okkum í hendi innan mánadagin 16. juni og skal stílast til:

**NEMA**
Starvsfólkadeildin, att: Sam Jakobsen, HR-leiðara
Brekkutún 4
Postmoga 109
110 Tórshavn



casa
www.casa.fo

SENDISTOVAN